# Prestar koma

**Ikki færri enn fimm nýggir prestar og ein dómpróstur skulu setast í starv og innsetast hesar komandi dagarnar og vikurnar. Onkrir eru longu settir, meðan avgerð væntandi fellur um trý prestastørv hesa vikuna. – Øll størvini verða sett frá 1. februar í ár, hevur Jógvan Fríðriksson, bispur áður boðað frá**



PRESTAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kirkjan:** Tey nývaldu kirkjuráðini vóru ikki meiri enn farin til verka í desember, tá fyrsta stórmálið kom til viðgerðar.

Í samfull hálvtriðja ár er eingin prestur settur í fast starv, men nú vóru øll viðurskifti greið, soleiðis at hetta kundi verða avgreitt við ikki færri enn seks størvum kring oyggjarnar.

Hesa tíðina hava skiftandi prestar røkt hesi størvini, men nú hava hesi – og onnur við – fingið møguleika at søkja um fast starv í Suðurstreymoy, Norðstreymoy, Norðoyggjum og á vestara armi á Skálafjørðinum.

Longu nú er greitt, at Ann Dahl Hansen er sett sum sóknarprestur í Suðurstreymoyar Eystara Prestagjaldi, saman við Una Næs sum eisini skal virka her, umframt starv sítt sum dómpróstur.

Somuleiðis er greitt, at kirkjuráðini í Norðoya Vestara Prestagjaldi hava sett Hanus á Gørðum í starv, og verður hann eftir ætlan innsettur í hetta starvið komandi sunnudag.

Hanus hevur verið fyribils settur í starvinum eitt skifti, men er nú vorðin sóknarprestur hjá íalt 5000 fólkum í Árnafjarðar, Kunoyar, Klaksvíkar, Húsa og Mikladals kirkjusóknum.

## Væl røkt størv

Tað hevur tikið sína tíð at fáa øll hesi viðurskiftini í rættlag. Og tá nú endiliga skuldi verða, skuldi alt avgreiðast eftir fáum døgum ella vikum.

Støðan er hon, at seinastu 2-3 árini er eingin prestur settur í fast starv. Síðani ólavsøku í 2007 hava prestar bara verið settir í fyribils størv fyri styttri tíðarskeið.

Eitt dømi um hetta er starvið sum sóknarprestur í Hvalba, sum Símun P. Jacobsen hevur røkt í eitt ávíst áramál. Í løtuni er støðan hon, at fyribilssetta starvssetan hansara er at enda komin í Suðuroyar Norðara Prestagjaldi. Áðurnevnda Ann Dahl Hansen hevur eisini virkað sum fyribils settur prestur í Suðurstreymoy í eina tíð.

Eftir drúgvar samráðingar hendi tað – fyri føroysku fólkakirkjuna gleðiliga – frambrotið, at Fíggjarmálaráðið og Prestafelagið skrivaðu undir ein sáttmála, soleiðis at viðurskiftini hjá prestunum komu í eina trygga legu.

Fyri Jógvan Fríðriksson, bisp og kirkjuligu myndugleikarnar annars hevur bíðitíðin uttan iva verið drúgv, og onkutíð hava tey helst eisini verið rættiliga ótolin. Men líkt er kortini til, at størvini hava verið væl røkt av teimum, sum fyribils hava mannað tey.

Hinvegin hevur bispur uttan iva kunnað staðfest, at hesa tíðina eru framstig hend á fleiri økjum, m.a. er nú gjørligt at seta tveir prestar aftrat í høvuðsstaðarøkinum – ein í vestara prestagjaldinum og ein í tí eystara.

Tað seinna starvið er longu sett, eins og starvið sum dómpróstur (sum eisini er at rokna sum sóknarpestur í Suðurstreymoyar Eystara Prestagjaldi) og sóknarprestur í Norðoya vestara prestagjaldi við heimstaði í Klaksvík.

Eftir at seta eru størvini í Sjóvar prestagjaldi, Norðstreymoyar prestagjaldi og í Suðurstreymoyar Vestara Prestagjaldi.

Sum skilst verða fundir at innstilla hesar tríggjar prestarnar hildnir komandi leygardag.

> *Summi vilja hava ein prest sum í prædikum sínum dregur fólkið nærri at Gudi. Summi vilja hava ein fólksligan prest. Summi ynskja ein prest sum ikki er fordømandi*

## Kvinnuligir og mannligir prestar

Tað eru tey ymisku kirkjuráðini sum taka avgerð um, hvønn tey innstilla sum nr. 1, 2 og 3.

Hvussu hesin fundurin verður fyriskipaður er greitt sagt frá í tí rúgvusmikla lógarverkinum um uppgávurnar hjá kirkjuráðunum. Ein háttur at skipa hesar fundir er at kalla inn øll kirkjuráðini í prestagjaldinum á ein og sama fund.

Á hesum fundi er eisini Jógvan Fríðriksson, og ein av hansara uppgávum er at kunna limirnar í kirkjuráðunum um teir ymisku umsøkjararnar. Undan fundinum hava kirkjuráðini



*Ann Dahl Hansen er sett sum sóknarprestur í Suðurstreymoyar Eystara prestagjaldi*



*Uni Næs er settur sum dómpróstur Føroya, eins og hann skal virka sum sóknarprestur í Suðurstreymoyar Eystara prestagjaldi*



*Hanus á Gørðum er settur sum sóknarprestur í Norðoya Vestara Prestagjaldi*